# Fjølritagrunnin

v/ Sigmund Poulsen, advokat
Skansavegur 1
100 Tórshavn
Telefon 312171
Fax 312227, 315874 og 312241

advokatvirkid@advokatvirkid.fo

## REGLUGERÐ FYRI FJØLRITAGRUNNIN

1. Sambært avtalum, sum feløgini, ið umboða rættindaeigararnar gera sínámillum, umsitur Fjølritagrunnurin peningin, sum kemur inn fyri loyvi at taka ljósrit og aðra endurgávu burtur úr verkum, ið eru vard við lógum og fyriskipanum um upphavsrætt og útgávurætt.

2. Endamál grunsins er at lætta um arbeiðskorini hjá listafólki og øðrum skapandi fólki í Føroyum og at stimbra samstarvið millum listagreinirnar og felagsskapir teirra. Í hesum samstarvi verður serligur dentur lagdur á at stuðla bókmentaligt arbeiði.

a. 70 % av játtanini, er markað til rithøvundar, forleggjar og blaðmenn.
b. 30 % eru markað til hini feløgini.
c. Útgjald úr grunninum, har talan er um, forleggja og rættindahavara, so skal útgjaldið gerast soleiðis sum býtið er ásett í sáttmálanum millum partarnar.
d. Grunnurin skal í sínum virki leggja dent á at styðja listaligar nýroyndir og royndir, ið annarsikki kundu verið gjørdar, og grunnurin kann sjálvur seta tiltøk í verk til at kveikja ella stimbralistaligt og mentunarligt arbeiði.

3.Grunnurin verður stýrdur av stjórnini í Fjølriti.

4. Partur av peninginum skal á hvørjum ári verða lagdur av til felags endamál, sum t.d.felagshús, felags skrivstovu og felags útgerð.
Stjórnin tekur annars avgerð um nýtslu av peninginum og ansar eftir, at tað, ið stendur eftir sum ogn, verður rentað á tryggan hátt.

5. Stjórnin kann einans taka avgerðir, tá ið hon er fullmannað. Er ikki semja, ræður vanliguratkvøðumeiriluti.

6. Allar avgerðir verða skrivaðar í gerðabók, og skal nevndin á hvørjum ári senda feløgunum í Fjølriti frágreiðing um virki sítt.

7. Roknskaparárið er virkisárið hjá Fjølriti. Roknskapurin verður grannskoðaður av alment skrásettum grannskoðara og sendur feløgunum saman við ársfrágreiðingini

Last Updated on Wednesday, 24 November 2010 16:25

Kelda: www.lisa.fo